Almannamálaráðið

Dagfesting: 27. november 2020
Mál nr.: 20/00596
Málsviðgjørt: JAK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunn, sum broytt við løgtingslóg nr. 140 frá 6. oktober 2011, løgtingslóg nr. 125 frá 7. desember 2012 og løgtingslóg nr. 81 frá 29. mai 2017, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 2. Grunnurin verður fyrisitin av einum stýri við 3 limum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir. *Stk. 2-5.* ...	**1.** Í § 2, stk. 1 verður "3 limum" broytt til: "5 limum".
§ 2. ... *Stk. 2* ... *Stk. 3.* Starvstíðin hjá stýrinum er 4 ár. *Stk. 4-5.* ...	**2.** § 2, stk. 3 verður orðað soleiðis: "*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin tilnevnir á 2. hvørjum ári ávikavist 3 og 2 stýrislimir."

§ 5 b. Húsalánsgrunnurin kann einsamallur ella saman við kommunum, feløgum og stovnum útvega, reka og leiga út íbúðir, íbúðahús og lestrarbýlir. *Stk. 2.* ...	**3.** Í § 5 b, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Húsalánsgrunnurin kann á sama hátt útvega lutaíbúðir til lutaíbúðafeløg og reka lutaíbúðir."
	4. Aftan á § 6 verður sum kapittul 3 a sett: **"Kapittul 3 a** **Ráðgeving um alternativar byggihættir** **§ 6 a.** Húsalánsgrunnurin veitir persónum ráðgeving um alternativar byggihættir. *Stk. 2.* Húsalánsgrunnurin kann móti gjaldi veita stovnum, kommunum, feløgum o.ø. ráðgeving um alternativar byggihættir."
	5. Aftan á § 8 b verður í kapittul 4 b sett: "**§ 8 c.** Húsalánsgrunnurin kann harafturat, eftir teimum treytum, ið ásettar eru í § 8 b, stk. 1-5, fíggja bústaðabygging upp til 450 mió. kr. *Stk. 2.* Av 450 mió. kr. skulu 125 mió. kr. fíggja bústaðabygging uttanfyri tey økir í landinum, har grundarlag er fyri kapping. Harafturat skulu 200 mió. kr. fíggja bústaðaverkætlanir til serligar málbólkar. Landsstýrismaðurin góðkennir staðseting og málbólk fyri verkætlanir til serligar málbólkar. *Stk. 3.* Tá Húsalánsgrunnurin í samstarvi við privat og íleggjarar fer undir verkætlanir á vanliga bústaðamarknaðinum í teimum økjum í landinum, har grundarlag er fyri kapping, skal grunnurin virka undir somu treytum sum teir partar, ið luttaka í verkætlanini saman við Húsalánsgrunninum. *Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð nærri reglur um verkætlanir á vanliga bústaðamarknaðinum, sum Húsalánsgrunnurin einsamallur fer undir

	í teimum økjum í landinum, har grundarlag er fyri kapping.”
	6. Aftan á § 8 c verður sum kapittul 4 c sett: **“Kapittul 4 c** **Partafelag** **§ 8 d.** Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta reglur, ið heimila Húsalánsgrunninum at stovna partafelag til partar av virkseminum. *Stk. 2*. Lánsheimildin sbrt. § 8 c, stk. 1 fevnir somuleiðis um partafelag, stovnað sbrt. stk. 1, við tí parti, sum Húsalánsgrunnurin eigur.”